FYLGISKJAL LM-116/2020

MEGINFELAG FØROYSKRA STUDENTA

**Uttanríkis- og Mentamálaráðið**
Tinghúsvegur 7
FO-100 Tórshavn

Tórshavn, 18. januar 2021

## Hoyringssvar í samband við uppskot um løgtingslóg til broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul

MFS hevur 5. januar 2021 fingið sendandi uppskot til hoyringar um broyting í lógini um lestrarstuðul. Endamálið við uppskotinum er at útvega lógarheimid til at hava eftirlit við lestrarvirkni hjá lesandi, ið fáa goldið út lestrarstuðul, lógarheimild at rinda skúlagjald hjá næmingum, ið taka miðnámsútbúgving á UWC hjá Reyða Krossi og at hækka upphæddina, ið lesandi undir hægri útbúgving kunnu fáa til tess at rinda skúlagjald uttanfyri Norðurlond.

MFS ráðið hevur á fundi 6. januar 2021 viðgjørt uppskotið, og hevur hesar viðmerkingar.

*Lestrarvirkni*

MFS tekur undir við, at havt verður eftirlit við lestrarvirkni hjá teimum, ið fáa lestrarstuðul frá Studna. Tað er rímiligt – og hevur eisini týdning fyri umdømi hjá Setrinum – at eftirlit er við, um lesandi, ið fáa studning, eisini reelt eru lesandi. Hetta er púra vanligt í grannalondunum. Kortini heldur MFS tað vera umráðandi, at lesandi, ið hava sera avmarkaða fíggjarorku, ikki kunnu enda í eini støðu, har tey fáa stór krøv um afturgjald av studninigi. Tí er avgerandi at lesandi fáa greið boð í góðari tíð, er illgruni um, at tey óheimilað fáa studning.

*UWC*

MFS umboðar ikki miðnámsskúlalesandi og hevur tí ongar viðmerkingar um stuðul til skúlagjald á UWC.

*Stuðul til skúlagjald uttanfyri Norðurlond*

Ráðið fegnast um at stuðulin til skúlagjald uttan fyri Norðurlond hækkar aftur. MFS hevur í fleiri umførum gjørt vart við týdningin av, at lesandi føroyingar eisini fara út um

Hoydalsvegur 1
FO-100 Tórshavn

Telefon: +298 737080
mfs@mfs.fo
www.mfs.fo

MEGINFELAG FØROYSKRA STUDENTA

Norðurlond at leita sær vitan, ið føroyska samfelagið kann fáa gagn av. Skúlagjaldið er størsta forðingin í hesum sambandi. Ráðið setur tó spurnartekin við, hvussu komið er fram til avgerðina at seta upphæddina upp á 100.000 kr. Tá upphæddin varð skorðin úr 120.000 kr. niður í 80.000 kr. í 2009, fýltist MFS á vantandi sakligar grundgevingar. Talan var um eina reina sparing, ið bert hevði til endamáls at pynta um undirskotið á fíggjarlógini.

Tí heldur MFS eisini, at upphæddin eigur at verða økt aftur til tað, hon var áðrenn niðurskurðin í 2009. Eisini saknar ráðið sakligar grundgevingar í samband við hækkan og lækkan av upphæddini til skúlagjald. Ynskiligt hevði verið at upphæddirnar í framtíðini vóru ásettar við støðið í eini fakligari meting eftir føstum leisti.

*Vinarliga,*

**Tór Marni Weihe**
Forseti

Hoydalsvegur 1
FO-100 Tórshavn

Telefon: +298 737080
mfs@mfs.fo
www.mfs.fo